# Tónleikaseminar mánadagin

Síðani september hevur Urd Johannesen arbeitt við eini spennandi verkætlan um rútmiskan tónleik í Føroyum, og hvat kann gerast fyri at menna hann. Í sambandi við hesa verkætlanina skipar hon fyri einum seminari mánakvøldið, har ljós verður kastað á tónleikin

112 fólk hava meldað til seminarið, sum verður í Norðurlandahúsinum allan mánadagin. Urd Johannesen fyriskipari, sigur, at hon vil hava tónleikararnar sjálvar at koma við í kjakið.

Hon sigur, at fýra fyrilestrar verða hildnir, umframt kjak. Ein fyrilestrahaldari er úr Svøríki, ein úr Íslandi, ein úr Danmark og ein úr Føroyum.

– Eg valdi Svøríki, tí tey hava altíð ligið frammaliga, tá tað kemut til tónleikin. Tað kundi verið áhugavert at vitað, hvussu tey hava skipað seg og borið seg at at komið so langt. Ísland valdi eg, tí tað er tað landið, ið líkist Føroyum mest, hvat ið mentan og umstøðum viðvíkur. Tey eru bara nakað nógv frammaligari enn vit. Danmark er áhugavert í tónleikahøpi, tí har eru tey farin at satsa stórt uppá tónleikin í seinastuni. Føroyski fyrilestrahaldarin er við, tí eg haldi tað vera áhugavert hjá tónleikarunum at hoyra, hvussu tey, sum eru komin nakað ávegis, hava megnað at koma so langt, greiðir Urd Johannesen frá.

Hon sigur, at seminarið verður býtt í trý. 1) Hvørjar karmar hava føroyskir tónleikarar og hvørji almen átøk eru neyðug um tónleikurin skal mennast. 2) Hvussu skal ein møgulig føroysk tónleikavinna skipast. 3) Hvat kunnu tónleikararnir sjálvir gera, fyri at koma so langt sum gjørligt.

Urd sigur, at áhugin er stórur, og at bæði tónleikarar, tónleikafeløg og fyritøkur hava meldað til seminarið.



# Rógva fyri fólkaheilsuni í Vági

### Í dag taka vágbingar ár í hond

Í dag klokkan 14 verða grindbátarnir í Vági flotaðir. Og tað verða teir hvønn leygardag fram til jóla.
Hetta er eitt lið í stóra átakinum hjákunningarstovuni fyri eini betri fólkaheilsu.

Vágbingar hava tikið væl undir við fólkaheilsuverkætlanini, sum byrjaði fyri tveimum viku síðani. Hvørt ónskvøld fram til jóla verður gingið, runnið ella súkklað. Túrarnir byrja altíð við Kunningarstovuna í Vági 19.00 og tað er ókeypis og higartil hava 50-60 fólk verið við hvørjaferð.

Leygardagin verður so annar partur í átakinum fyri fólkheiluna

Føroyingar eru føddur við ár í hond og í dag er ætlanin at lokka vágbingar til árarnar.

Tiltakið er ætlað kvinnum og monnum. Sjálvandi er tað veðrið sum avgerð hvar farið verður og hvussu leingi túrurin varir.

Aftaná rógvitúrin leygardagar fæst drekkamuður og okkurt gott afturvið til keyps á Hotel Bakkanum.

Tey, sum vilja verða við til hetta óvanliga tiltakið til frama fyri fólkaheilsuna, møta á kunningarstovuni klokkan 14 leygardagin



*Leiklistaráðið á fundi. Fysta uppgávan verður at seta ein stjóra til Tjóðpall Føroya, sum ætlandi skal byrja 1. januar 2005*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Stjóri til Tjóðpall Føroya finnast

**Eftir drúgvar seinkingar, millum annað orsakað av valinum, er arbeiðið við Tjóðpalli Føroya nú langt um leingi byrjað. Leiklistaráðið er mannað, við Anniku Sølvará sum formanni, og fyrsta uppgávan verður at finna ein stjóra til Tjóðpallin**

TJÓÐPALLUR FØROYA
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Fyri einum góðum ári síðani varð samtykt at seta á stovn Tjóðpall Føroya. Nú er arbeiðið av álvara um at koma í gongd, og Leiklistaráðið hevur longu havt fleiri fundir.

Annika Sølvará, formaður, sigur, at allarfyrsta uppgávan verður at seta ein stjóra.

– Ætlanin er, at viðkomandi skal byrja arbeiðið, í seinasta lagi 1. januar. Ì løtuni arbeiða vit við at skriva eina starvslýsing, sum verður kunngjørd í næstu framtíð. Hetta verður eitt sera spennandi og avbjóðandi starv, so vónandi verða tað fleiri áhugað, sigur Annika.

Hon sigur, at lógin leggur upp til eitt tætt samstarv ímillum stjóran og Leiklistaráðið, sum er evsti mynduleiki á Tjóðpallinum.

– Leiklistaráðið er sett saman av umboðum fyri yrkisleiklist og áhugaleik, einum av starvsfólkunum á Tjóðpallinum, umboðum fyri LISA, umboðum fyri Tórshavnar býráð og umboðum fyri mentamálaráðið. Á henda hátt verða nógvar meiningar og áhugamál umboðað, so Tjóðpallurin verður so breiður sum gjørligt, sigur Annika.

### Fyrsti stjórin

Annika Sølvará sigur, at høvuðsuppgávan hjá fyrsta stjóranum á landsins Tjóðpalli, verður at fáa alt at fungera.

– Tað fyrsta málið verður sjálvsagt at menna yrkisleiklistina í Føroyum, og at geva teimum, sum arbeiða við henni, nøkur virðilig arbeiðskor. Í dag eru korini út av lagi vánalig, og tað skal Tjóðpallurin ætlandi bøta um, sigur hon.

Annika sigur, at komandi stjórin eisini fær ábyrgdina av at seta fólk í arbeiði, og at menna samstarvið ímillum allar partar av leiklist í Føroyum.

– Av tí, at hetta eru fyrstu stiginí vit taka, er neyðugt, at stjórin verður onkur, sum hevur kunnleika til føroyska leiklist. Onkur, sum veit hvat er farið fram á økinum, og sum hevur visiónir til at menna tað. Tí ætla vit ikki at fara serliga langt út um Føroyar at leita eftir viðkomandi, sigur Annika.

Hon sigur, at tað verður eitt strævið arbeiði at fáa Tjóðpallin upp á beinini at standa, tí játtanin er avgjørt ikki serliga høg.

– Vit fáa 3,5 mió, harav nakað fer til MáF og til stuðul til verkætlanir innan yrkisleiklist. Tað eru avgjørt ikki nógvir pengar, tá tosað verður um at fáa Tjóðpallin á føtur. Sjálvandi høvdu vit, eins og øll onnur, vónað at fingið eina hægri játtan, nú nýggja fíggjarlógin er klár. Hinvegin fegnast vit um, at vit ikki eru skerd nakað, sum so mong onnur eru, staðfestir Annika Sølvará og heldur fram, – Hetta eru arbeiðskorini, og vit fara at gera alt, vit kunnu, fyri at fáa sum mest burturúr pengunum. Vit mugu bara hugsa kreativt og ikki seta ambitiónirnar ov høgt, sigur hon.

### Økið skal mennast

Annika sigur, at tað er alneyðugt, at vit nú fáa ment okkara leiklistarliga øki.

– Fólk hava arbeitt við leiki burturav í áravís. Hetta eru fólk við longum og góðum útbúgvingum ella drúgvum royndum innan leiklist, men tey arbeiða fyri nógv minni løn, enn flestu onnur fólk høvdu funnið seg í. Higartil hava vit ikki dugað at nóg væl at nýtt teirra evni og teirra royndir til fullnar, sigur Annika.

Hon sigur, at við Tjóðpallinum er ætlanin at bøta um hetta.

– Tað verður neyðugt at seta fólk í fast starv í longri tíð. Tað er nakað, sum fólk innan leiklist í Føroyum ikki eru von við, sigur hon. Annika heldur, at Tjóðpallurin veruliga hevur manglað í føroyska samfelagnum.

– Hesi fólkini hava lagt eitt ótrúligt arbeiði í leiklistina, men spurningurin er, hvørt tey høvdu havt orku at hildið á leingi afturat. Eisini er hugsandi, at vit hava nógvar evnaríkar sjónleikarar, sum ikki hava hættað sær at útbúgvið seg innan leiklistina, orsakað av vantandi arbeiðsmøguleikunum. Vónandi kann Tjóðpallurin bøta um hetta, sigur hon.

Annika greiðir frá, at Leiklistaráðið saman við stjóranum skal arbeiða við at fáa eitt enn betri samstarv í lag ímillum áhugaleikarar og yrkisleikarar. Eisini er ætlanin at fáa samantvinnað leiklistina við aðrar listagreinir, soleiðis, at samstarvið gerst fjøltáttað og sterkt.

– Ymisku listagreinarnar hava altíð havt nakað av samstarvið sínamillum, men tað hevur ikki verið formliga skipað. Tað skulu vit broyta við Tjóðpallinum, staðfestir Annika.

Annika Sølvará sigur, at áhugin fyri leiki sum heild er sera stórur í Føroyum.

– Tað hendir so nógv allatíðina, bæði innan yrkisleik og áhugaleik, og tað eru altíð nógv fólk til framførðslurnar. Tí verður stjórastarvið á Tjóðpalli Føroya at kalla eitt lyklastarv, sum skal sameina leiklistina við aðrar listagreinir og skipa alt á bestan hátt, so vanligi føroyingurin eisini fær sum mest burturúr Tjóðpallinum, sigur Annika Sølvará at enda.

# ítróttur

Nr. 183 • leygardagur • 25. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Klaksvík fær landsdyst

**Landsdysturin ímillum kvinnulandsliðini hjá Føroyum og Írlandi tann 12. oktober skal spælast á grasliki í Klaksvík.**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Føroyska kvinnulandsliðið í fótbólti skal týsdagin 12. oktober spæla landsdyst ímóti Írlandi, og Fótbóltssambandið hevur gjørt av, at hesin dysturin skal spælast í Klaksvík.

Dysturin er komin í lag, tí føroyska mansliðið spælir ímóti Írlandi um sama mundið, og so verður serliga flogsambandið úr Føroyum til Írlands nýtt til fulnar.

Somu viku í oktober mánaði verður ein U19 EM-kapping í Føroyum, og teir seks dystirnir skulu allir spælast á grasvøllunum á Toftum og í Havn.

Tí er trýstið á hesi vøllir ivaleysa stórt júst tá, og FSF hevur saman við írska fótbóltssambandinum gjørt av, at vinardysturin hjá kvinnunum kann spælast á graslíki.

FSF hevur síðani lagt dystin at vera í Klaksvík týskvøldið 12. oktober, og at júst Klaksvík hevur fingið dystin, kemst ivaleyst av, at nógvir spælarar úr KÍ eru á liðnum, og at áhugin fyri kvinnufótbólti er størst júst í Klaksvík.

## Tøtt telving millum teir næstbestu

**Tað er bara spenningur um bronsuplássið í bestu deildini, meðan tað framvegis er spenningur um uppflytingina, har tað er møguleiki fyri, at landsliðið kann fara at spæla eitt puss**

ENDAUMFARIÐ
*Jóannes Hansen*

Tá ið átjanda leikumfarið í trimum teimum ovastu fótbóltsdeildunum er á skránni í hesum vikuskiftinum, verður alt avgjørt í dag. Vanliga plagar 2. deild at spæla leygardag og hinar báðar deildirnar sunnudag. Men seinnu árini hevur tað verið soleiðis, at í átjanda umfarinum hevur bara verið spælt leygardag, og soleiðis er tað eisini hesa ferð. Hetta er eisini tað, sum stendur í skipanini.

Fótbóltssambandið boðar frá, at allir dystirnir í 3. deild verða spældir á middegi í dag. Klokkan 14 verða allir dystirnir í 2. deild spældir, og klokkan 16 verða allir dystirnir í 1. deild á skránni. Tað vil við øðrum orðum siga, at gullkrónurnar og meistarasteypið, sum Føroya Bjór í 1996 gav at kappast um, eftir at GÍ í 1995 hevði vunnið steypið til ognar, sum Føroya Bjór hevði sett út í 1991, fer at verða handað HB til ognar umleið klokkan knapt seks í kvøld. So er eftir at vóna, at líkindini vera hampuliga góð, soleiðis at tað fer at bera til at avmynda meistaraliðið soleiðis, sum tað eigur at verða gjørt.

Silvurkrónurnar verða handaðar B36 í Gundadali, og bronsumerkini verða handað á Mølini á Eiði. Úrslitið í dag fer at gera av, um tað verður Skála ella EB/Streymur, sum fer at taka ímóti bronsu krónunum.

### Gullið á Sevmýri

Í 2. deild er spenningurin rættuliga stórur. TB og B71 liggja stavn um stavn við 35 stigum. Í innanhýsis dystum stendur tað á jøvnum – B71 og TB hava bæði vunnið heimadystirnar móti hvørjum øðrum – og í málmuni er TB fimm betri enn B71. AB hevur 32 stig og pluss sjey í málmuni. TB eigur heimavøll móti VB, sum longu er flutt niður í 3. deild, meðan B71 skal spæla móti B36 í Gundadali. AB skal spæla í Vágum.

Um øll tey trý oddaliðini fáa trý stig í síðsta umfarinum, so fer TB at flyta beinleiðis upp, og so skal B71 spæla tveir dystir móti ÍF um plássið í bestu deildini. Um B71 einki fær burturúr í Gundadali, og AB samstundis vinnur í Vágum, so fer at standa á jøvnum í stigum millum B71 og AB. Innnanhýsis hava tey vunnið hvør sína ferðina. AB vann 4-2 á Argjum, og B71 vann 2-1 á Sandi. Tað eru bara stigini og ikki málini í innanhýsis uppgerðum, sum eru avgerandi. Tað vil við øðrum orðum siga, at so verður málmunurin avgerandi, og har er B71 í løtuni væl betri, enn AB er tað. TB hevur +22, B71 +17 og AB +7 mál.

Tað verður ein trupulleiki, um TB fer at enda næstfremst og harvið skal í endaspæl. Óli Johannesen skal týsdagin av landinum við landsliðnum, og hann verður ikki aftur fyrrenn annan hósmorgun. TB fer ikki í møguligt endaspæl uttan liðformannin á landsliðnum. Tað vil siga, at um TB skal spæla móti ÍF, so verður einki á skránni fyrrenn um tvær vikur!

EB/STREYMUR-SKÁLA:

## Annar parturin verður vónsvikin

**Á Skála eru teir betri fyri enn leingi, tá ið teir fara á Mølina at stríðast um at fáa bronsukrónurnar, sum hvørki teir alla EB/Streymur, sum ikki hevur alt fólkið tókt, áður hava vunnið**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Tað er greitt undan uppgerðini. Annar av pørtunum á Mølini seinnapartin í dag verður ógvuliga vónbrotin, og hin parturin verður hjartans fegin. Hvørki EB/Streymur ella Skála hava áður vunnið heiðursmerkir. Í dag hava báðir hesir partarnir møguleika fyri tí. Um tað verður javnleikur, fer Skála at fáa heiðursmerkini, og teir fáa tey sjálvandi eisini, um teir vinna. EB/Streymur skal vinna á heimavølli fyri at fáa heiðursmerkini.

Seinastu fýra ferðirnar hevur EBStreymur ikki tapt, meðan Skála ikki hevur vunnið fýra tær seinastu ferðirnar. Skála hevur ligið á heiðursmerkjaplássunum alt kappingarárið, men nú er møguleiki fyri, at teir skulu missa á stokkinum.

Hjá EB/Streymi er vongverjin í vinstru, Jóhann á Stongum, burturstaddur. Esmar Eiðisgarð og hann hava kappast um plássið og næstan skiftst um at spæla, so tað er upplagt, at Esmar fer at loysa av. Hallur Jacobsen er skaddur, og tað er ivi um tríggjar aðrar spælarar. Største áhugan hevur tað, hvussu tað fer at verða við Sorin Anghel. Mánakvøldið segðist tað, at hann breyt nøsina á Svangaskarði. Hóskvøldið var hann eina lítla løtu og vandi, men í gjár var tað ikki greitt, um hann verður tøkur í dag.

Fróði Clementsen noyddist av vøllinum í steðginum, tá ið EB/Streymur var á Toftum, tí hann hevði trupulleikar við rivjabeinunum. Hann hevur ikki vant, men teir vónaðu í gjár, at hann fór at verða førur fyri at spæla. Tað sama vónaðu teir fyri Knút Vesturtún, sum varð innskiftur mánakvøldið. Hann hevur drigist við bruna í beininum.

3. deildarliðið hjá EB/Streymi tapti hóskvøldið 2-0 á Svangaskarði. Tá var Arnbjørn T. Hansen á liðnum. Mikukvøldið var hann við til at vinna unglingafinaluna, og teir roknaðu í gjár við, at hann verður í 1. deildarhópinum í dag.



*Skála og EB/Streymur skulu gera av, hvør av teimum fær bronsukrónur og europeisk atgongumerki*

### Betri enn leingi

Høvuðsorsøkin, til at tað ikki hevur hilnast so væl hjá Skála eftir summarsteðgin, er, at so nógvir spælarar hava verið burturi frá orsaka av skaðum og leikbannum. Hesa ferð eru ábendingar um, at tað stendur betri til á Skála, enn tað hevur gjørt leingi.

Arnhold Berg er leikbannaður, og verður tískil ikki við á Eiði. Allir hinir eru tøkir. Nenad Stankovic, Iulian Florescu og Bárður Danielsen vóru leikbannaðir móti NSÍ. Nú eru teir tøkir. Pauli G. Hansen er rættuliga komin fyri seg eftir drúgva skaðan, og hann verður ikki minst týdningarmikil, tá ið Skála á Mølini fer at stríðast fyri at halda tørn um bronsuplássið.

Enn hevur einki verið at hoyrt um sáttmálar og útsøgnir frá nevndunum. Men tað skilst, at nógv bendir á, at Piotr Krakowski fer at halda fram sum venjari á Eiði, og at Johan Nielsen fer at halda fram á Skála. Í dag fara liðini hjá teimum báðum at gera av innanhýsis, hvat av teimum næsta ár skal spæla í Intertoto.